3. apríl 2020

Viðtøkur fyri

# Betri Banka P/F

betri

# Viðtøkur fyri Betri Banka P/F

## 1. Navn felagsins, heimstaður og endamál

**1.1.** Navn felagsins er Betri Banki P/F. Hjánøvn felagsins eru Eik Banki, Eik Banki Føroya, Eikibanki, Eik Bank, Eik Bank International og Føroya Sparikassi.

**1.2** Heimstaður felagsins er Tórshavnar Kommuna.

**1.2.** Endamál felagsins er at reka peningastovnsvirksemi, virðisbrævahandil og annað sambært lóggávuni um fíggjarligt virksemi loyvt virksemi.

## 2. Partapeningur felagsins og partabrøv

**2.1** Partapeningur felagsins er 100 mió kr. býttur í partabrøv á 1 kr. og margfald av hesum.

**2.2** Partabrøvini skulu ljóða upp á navn og verða skrivað inn í partabrævabók felagsins.

**2.3** Partabrøvini eru ikki umfaraskjøl.

**2.4.** Partabrøv verða ikki útgivin, uttan so at ein ella fleiri partaeigarar, ið eiga ein tíggjundapart av partapeninginum ynskja tað.

## 3. Aðalfundir

**3.1** Aðalfundir felagsins verða hildnir heimstaðarkommununi.

**3.2** Nevndin kallar inn til aðalfundar í fyrsta lagi 4 og í seinasta lagi 2 vikur undan aðalfundinum. Innkallingin fer fram umvegs heimasíðu felagsins.

**3.3** Innkallingin skal innihalda dagsskrá á aðalafundinum.

**3.4** Ársaðalfundur verður hildin hvørt ár í so góðari tíð, at grannskoðaða og góðkenda ársfrásøgnin kann verða send Fíggjareftirlitinum, so at Fíggjareftirlitið hevur móttikið hana áðrenn 4 mánaðir eftir, at roknskaparárið er endað.

**3.5** Dagsskráin á vanliga ársaðalfundinum skal fevna um:

**a)** Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári
**b)** Góðkenning av ársfrásøgnini
**c)** Avgerð um hvussu felagið skal nýta yvirskot ella svara fyri undirskoti sambært góðkendu ársfrásøgnini
**d)** Val av nevndarlimum
**e)** Val av grannskoðarum
**f)** Ymiskt

**3.6** Aðalfundurin verður stýrdur av einum av nevndini tilnevndum fundarstjóra.

**3.7** Á aðalfundi gevur hvørt partabræv upp á 1 kr. eina atkvøðu.

**3.8** Allar avgerðir á aðalfundi verða viðtiknar við vanligum atkvøðumeiriluta, uttan so at vinnufelagalógin ásetir serligar reglur um umboðan og meiriluta.

**3.9** Fjølmiðlar hava atgongd til aðalfundir felagsins.

**3.10** Samráðingarnar á aðalfundinum verða førdar í eina gerðabók, sum verður undirskrivað av fundarstjóranum. Í seinasta lagi 2 vikur eftir at aðalfundurin er hildin, skal eitt váttað úrrit av gerðabókini vera atkomuligt hjá kapitaleigarunum á skrivstovu felagsins.

## 4. Nevnd

**4.1** Felagið verður stýrt av eini á aðalfundinum valdari nevnd, ið hevur 3 – 6 limir. Nevndarlimir verða valdir fyri tvey ár í senn.

**4.2** Nevndarlimir fara frá ávikavist 1 og 2, 2 og 2, 2 og 3 ella 3 og 3 limir eftir støðd á nevndini á hvørjum ári.

**4.3** Nevndin tekur sínar avgerðir við vanligum atkvøðu-meiriluta. Stendur á jøvnum er atkvøða formansins avgerandi.

**4.4** Nevndin ásetir í eini starvsskipan gjøllari reglur um útinnan av starvi sínum. Starvsskipanin skal til hvørja tíð vera í samsvari við vinnufelagalógina.

**4.5** Nevndarlimir skulu fara úr nevndini um árslok tað árið, ið viðkomandi fyllir 70 ár.

## 5. Stjórn

**5.1** Nevndin setir eina stjórn, mannað við 1 – 3 limum, at taka sær av dagliga rakstri felagsins.

**5.2** Nevndin sær til at gera skrivligar leiðreglur fyri tey mest týðandi økini, har arbeiðsbýtið millum nevnd og stjórn er skipað.

## 6. Tekningarreglur

**6.1** Felagið verður teknað av allari nevndini, av nevndarformanninum og næstformanninum í felag ella av nevndarformanninum ella næstformanninum saman við annaðhvørt einum stjóra ella nevndarlimi.

**6.2** Nevndin kann veita álitisfulltrú.

## 7. Grannskoðan

**7.1** Ársfrásagnir felagsins verða grannskoðaðar av minst einum av aðalfundinum valdum løggildum grannskoðara, sum verður valdur fyri 1 ár í senn.

**7.2** Fer ein av grannskoðarum felagsin frá, skal nevndin í seinasta lagi 8 dagar eftir, at felagið hevur fingið fráboðan um fráfaringina, kalla inn til eykaaðalfund at velja nýggjan grannskoðara.

## 8. Roknskaparár

**8.1** Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

**8.2** Fyrsta roknskaparár gongur frá stovnan felagsins til 31. desember 2011.

## 9. Endurgjald

**9.1** Nevndin verður heimilað at binda felagið við virknaði frá tí, at felagið varð stovnað at endurgjalda limum í stjórnini:

**(i)** eitt og hvørt endurgjaldskrav móti einum stjóra, ið stendst av útinnanini av starvi hansara sum stjóri, uttan so at tað snýr seg um eitt krav eftir føroyskum rætti, ið verður gjørt galdandi við Føroya Rætt,

**(ii)** útreiðslur til sakarmálskostnað o. m. í sambandi við rættarmál, ið eru fevnd av (i).

**9.2** Nevndin verður heimilað at siga frá sær, at felagið:

**(i)** setir aftursóknarkrav fram um endurgjaldsupphæddir og sakarmálskostnaðir o. m. fevnd av endurgjaldinum, ið felagið hevur goldið triðjamanni í endurgjaldi og sakar-kostnaði o. m.,

**(ii)** endurgjaldskrøv fyri miss, ið er hægri enn tryggingar-dekningurin fyri stjóran, treytað av at stjórin bara hevur borið seg minni óskettið at.

Soleiðis viðtiknar á stovnandi aðalfundi felagsins tann 12. oktober 2010 og sum broyttar á eykaaðalfundum tann 6. januar 2011, tann 18. mars 2011, tann 6. apríl 2011, tann 21. juli 2011, ársaðalfundinum tann 29. mars 2012 og ársaðalfundinum tann 13. mars 2013.